Frálík bók við ringum lýti

The Restructuring of the Faroese Economy, Granskingardepilin fyri økismenning.

Samfundslitteratur, København 2002.

UMMÆLI
Rolf Guttesen

Rolf Guttesen, professari við lærda háskúlan í Keypmannahavn, ummælir bókina The Restructuring of the Faroese Economy

Ein snotilig bók er send mær til ummælis, sum fimm manns á Granskingardeplinum fyri Økismenning í Klaksvík hava skrivað. Teir eru B. Mortensen, Ó. Høgnesen, G. Hovgaard, D. Holm og R. Apostle. Hon er útgivin á danska forlagnum Samfundslitteratur í Keypmannahavn.

Bókin er skrivað á eingilskum. Og tað kann væl undra, eftir sum áhugin fyri úrslitum og ráðum frá hesum unga stovni man vera størstur í Føroyum. Men teir skriva í innganginum, at hon fer at koma á føroyskum seinni.

Tittulin er The Restructuring of the Faroese Economy ella umskipan av føroyska búskapinum, hóast eingin teirra er búskaparfrøðingur, og í tí liggur, at teir leggja dent á tað, sum hent er seinastu 10 árini. Tann umskipan ella umstrukturering, sum er farin fram aftaná kreppuna fyrst í 90-unum. Har er eisini ein undirtittul: 'The Significance of the inner Periphery', ella týdningurin af innaru periferiini ella útjaðaranum. Hvat, ið henda sonevnda innara periferi er, skal eg venda aftur til seinni.

Uppbygging av bókini

Fýra kapitlar viðgera sonevnd "case-studies" ella eru kanningar av ítøkiligum dømum, og tey eru í stuttum Tvøroyri-Vágur, Fuglafjørður, Klaksvík og so alivinnan. Tey verða við tí fyri eygað at finna tað, sum er eins, og tað, sum líkist frá í hesum dømum, hvat viðvíkur fortreytum, útvikling, kreppuárin og so hvussu bygdirnar komu sær undan hesa kreppu aftur.

Eitt fyrsta og síðsta kapittul skrivar um teori. Tað ætlaði eg ikki at gera nógv burturúr, tí tey fýra konkretu kapitlini kunnu saktans lesast uttan nakra upplæring í post-fordismu. Eitt áhugavert hugtak verður viðgjørt teir kalla coping strategies. Tað kann kanska umskrivast til: Hvussu gerast vit før fyri at leggja eina leið, at vit gerast før fyri at vinna á trupulleikunum? Dentur verður lagdur á at leita eftir hesum strategium í teim viðgjørdu dømunum. Og tað er skilagott. Men spurningurin er um hesar størru bygdir hava havt nakra strategi sum tær hava roynt at realisera. Tað haldi eg ikki man kann siga. Úrslitið man mest vera eitt rættiliga tilvildarligt úrslit av persónum og tratitiónum.

Annars kann sigast, at djúptgangandi kanningar av "exemplariskum" dømum kunnu geva eina góða fatan av teim veruligu strukturunum og mekanismunum, sum liggja í gongdini og broytingunum har. Klaksvíkingarnir brúka sjálvir hugtakið "mechanism" onkunstaðni, men tað er ógreitt um teir byggja á eitt ástøði sum nevnist "cirtical realism". Eingilsmaðurin Andrew Sayer, sosiologur í Lancaster, nevnir hetta slag av kanningum "intensive research", sum merkir, at kanningin fer í dýpdina í fáum vælvaldum dømum, fyri har at finna tær virkandi mekanismurnar, sum kunnu forklára gongdina. Sostatt forkastar hann tað "ekstensiva" slagið av kanningum, (positivisma), sum brúka tonsavís av tølum og statistikki, sum ongantið kann geva meira enn nakrar leysar ábendingar um tað, sum veruliga liggur undir.

Metoda ella framferðarháttur

Um framferðarháttin, metoduna, siga teir at teir skilja millum

- 1: miðdepilin, sum er Tórshavnarøkið,
- 2: innaru periferiina, sum eru kommunur, sum hava fleri enn 1000 íbúgvar, tað eru Klaksvík, Runavík-Nes, Vestmanna, Miðvág, Tvøroyri og Vágur.
- Restin kallast so ytra periferiin, og í hesum bólki koma so bæði Kirkjubøur og Mykines, Sumba og Gøta, Sjóvar og Svínoy. Eg haldi ikki, at ein slík uppbýting er haldgóð ella skilagóð.

Teir hyggja (næstan) blint eftir kommunum og teirra fólkatali. Her falla teir aftur í gamla positivismu og taxonomi. Teir hyggja ikki eftir funktiónellum økjum. Um bygdir, býir ella økir heva góða havn, nógv arbeiðspláss, handil ella tænastur. Teir leggja Nes og Runavík saman, men ikki Sandavág-Miðvág. Og Sjóvar kommuna hevði 1. jan. 2000 longu 1003 íbúgvar.

Hví Kirkjubøur liggur í ytru periferi, men Kaldbak í miðdeplinum, tí henda gamla kommuna einaferð fór uppí Havnar kommunu, fái eg onga meining í. So her er okkurt teoretiskt teir eiga at hugsa ígjøgnum enn eina ferð.

Sjálvir skriva teir í viðgerðini av stóru bygdunum í Suðuroynni eitt brot, sum kallast The problem of distance (s. 68). Og júst hetta, frástøðan ella ferðingatíðin til Havnar og miðøkið, hevur størri týdning enn tað at kommunan hevur 999 ella 1011 íbúgvar.

Fýra konkret dømir

Lýsingarnar av teim fýra konkretu dømunum eru heilt upplýsandi. Onkuntið kemur væl av gamlari søgu við, men aðrastaðni er í so nógv av smáputli við, til dømis tá sagt verður frá, at bókhaldarin í einum firma er ein 75 ára gomul kona, sum lærdi at skriva teldu tá hon var 60. Annars eru teir beskrivandi partarnir til tíðir skiftandi í presisión. Onkuntíð fáa vit bæði bygd, for- og eftirnavn, onkuntíð fáa vit hvørki bygd ella navn. Men sum heild er hetta rættiliga forvitnisligur lestur.

Kaos í staðanøvnum. Hvar liggja Bird Cove og Cross bay???

Tó noyðist eg at nevna at fiskur verður seldur til Faeroese buyers in Gentle bay and Midway. Er tað Midway í Kyrrahavinum, teir meina við? So fara teir á somu síðu til felagið South Salmon, sum millum annað virkar í South Bay og hevur keypt aliloyvi í Midpoint, og teir hava aliringar í Whale Harbour. Okkurt gongur fyri seg í Pirates Cove, og teir hava samband við onkran í Bird Cove. Okkurt hendir í Cross Bay og Whale Cove. Eg royndi at hyggja at Føroyakortinum, men eg var púra (lost(. Heldur ikki telefonbókin ella vegaskeltini kundu føra meg til Contrary Bay ella Pig Bay. Og gamla fiskikortið hjá bretskum trolaraskiparum "Close's Fischermen's Chart" hevur ikki brúkt hesa forbrongling ella staðanavnaimperialismu.

Á síðu 148 fara teir til Norðoyggjarnar, giti eg. Umtala eitt firma North Salmon og okkurt liggur í North Bay og Whale Sound, og longu nú eri eg vilstur aftur. Men tokan lættir eitt sindur í Harold's Sound, sum kanska er Haraldssund. Eisini royni eg at gita, at Sundafjørður skal vera Sundalagið.

Tíverri er hetta tað reina kaos. Tað líkist ongum at skriva sovorðið volapykk. Her átti Høgnesen, sum er medhøvundur saman við Apostle, at lisið rættlestur meira enn einaferð.

Men í grundini hava føroyskir staðanavna-sjonglørar við Svenning Tausen á odda sjálvir lagt kósina. Teir hava í Heimsatlassinum, sum verður brúkt í skúlunum, sjálvir víst leiðina, og brongla staðnøvn víða hvar í verðini. Grønhøvdaoyggjar, Hammerfjørður, Móritania, Høvdastaður og Kili.

Fylgja vit logikkinum í Heimsatlassinum, so er tað heilt og fult í lagi, at ein eingilsmaður ella canadiari skrivar um Contrary Point og Pig Bay, tá teir innføddu í Føroyum tosa um Tvøroyri og Porkeri.

Keðilig lýti í annars spennandi bók

Men sum heild meti eg hetta at vera eitt rímiligt stig frammá hjá økismenningardeplinum. Savnan, skipan og útskriving av vitan um nýggjaru søguna, hvussu samfelagið er samansett og virkar í dag er neyðugt.

Fotomyndirnar eru ikki allar líka góðar, men fleiri kort og tabellir eru í lagi. Kanska manglar eitt index ella evnisorða- og navnalisti, tað hevði gjørt tilfarið brúkiligari. Men hetta kann rættast í komandi føroysku útgávuni.

"Inngangsbønina", ein Afturímóti er permumyndin eftir Ingálv av Reyni vælvald. Hon kann útleggjast bæði sum kenslur, ein forvirraður veruleiki og trupulleikar við at 'strukturera' lívið og tilveruna.

Tað er Granskingardepilin fyri økismenning, sum hevur latið bókina The Restructuring of the Faroese Economy úr hondum. Á myndini síggjast nakrir av rithøvundanum á tíðindafundi í sambandi við at bókin varð løgd fram fyri almenningin
Mynd: Finnur Justinussen

VIÐMERKINGAR

Uttanríkispoltikkurin hjá tjóðveldisflokkinum váttaður:

At seta ilt millum fólk!

Óli Jacobsen

Eitt av endamálunum við fullveldisætlanunum hevur verið, at Føroyar skuldu fáa sín plass á heimspolitiska leikpallinum, ella "eina flaggstong í New York", sum tað hevur verið tikið til. Hetta kann eisini vera ein góður tanki. Í heimspolitikkinum eru nógvar góðar kreftir, sum royna at bøta um støðuna í heiminum, og her er altið brúk fyri góðum kreftum afturat. Tí tað vísir seg nevniliga, at uttan mun til, hvussu nógvar kreftir ið eru, sum vilja byggja upp, so eru eins nógvar, sum vilja bróta niður, og tað er so nógv lættari. Miðeystur er eitt gott dømi um hetta.

Tjóðveldisflokkurin fingið platform.

Tjóðveldisflokkurin fekk við fólkatingsvalið ein platform, sum kann vísa, hvat flokkurin stendur fyri á hesum øki. Hann hevur eisini longu staðfest, hvønn leiklut flokkurin ætlar sær at hava í viðurskiftum millum lond.

Og kann hetta verða lýst við ráðstevnuni, sum mitt í februar var hildin í Grønlandi, har viðgjørdir vóru teir ymsu møguleikarnir fyri sjálvstýri hjá einum landi sum Grønland, og tjóðveldisflokkurin á fólkatingi var umboðaður.

Henda ráðstevna varð viðgjørd sum høvuðstíðindi í "Fregnir", sum má roknast at vera málgagn fyri nevndu umboð, og tað vóru eisini hesi, sum eru keldan til hesi tíðindi. Íslendski professarin Gudmundur Alfredsson hevði eina framløgu um gongdina, tá Grønland í 1954 samb. donsku grundlógini gjørdist ein javnsettur partur av Danmark. Í fráboðan til ST hevði danska stjórnin ivast í, um fólkið í Grønlandi kundi kallast eskimoar, tí upprunafólkið var so nógv blandað við europearar.

Tjóðveldisflokkurin: "Donsk statsrasisma".

Hetta fekk onkran grønlendskan politikkara at tosa um danska "statsrasismu" á fundinum. Og hendan boðskapin hevur tjóðveldisflokkurin á fólkatingi verið skjótur at fáa útbreiddan í Føroyum. Lutvíst sum høvuðssøgu í Fregnir, men ikki minst á teimum "spísiseðlum", sum hava hingið í hvørjum kioskglugga í eini enn minni eru hansara sjónarmið umrødd.

Sermitsiak hevur umrøðu av íslendska professaranum, men hansara sjónarmið um "statsrasismu" eru als ikki nevnd. Men blaðið hevur eina oddagrein, sum meira enn annað vísir munin millum eitt seriøst blað og eitt sum ikki er tað. Fyrst verður nevnt, at danska professarin dr.jur. Frederik Harhoff, sum eisini var við á ráðstevnuni, er púra ósamdur við Alfredsson. Og Harhoff er júst blivin doktari uppá eina drúgva ritgerð um júst hetta evnið, nevniliga støðuna hjá Føroyum og Grønlandi í ríkisfelagsskapinum. So tað er ikki givið, at talan er um ein bíbilskan sannleika hjá Alfredsson!

Boðskapurin elvir til hatur millum danir og grønlendingar.

Í oddagreinini verður víst til orðaskiftið, sum hevur verið í Grønlandi um hesi sjónarmið. Tað er gott við orðaskifti, sigur blaðið, men í hesum førinum "kan (det) let... fá den konsekvens, at der opstår et had til Danmark og danskerne og altså en ny splittelse mellem de to befolkningsgrupper... det er ikke godt, at en hel befolkning inklusiv alle de danskere, der er taget til Grønland for at udføre et stykke arbejde, de er blevet bedt om, bliver lagt for had.

Seinni verður sagt í oddagreinini: Der er ingen tvivl om, at Danmark på de fleste områder i forholdet til Grønland lever op til internationale krav. Men på et par områder svigter Danmark. Det er i forhold til ejendomsretten til jorden og undergrunden, og det er i forhold til sikkerheds- og udenrigspolitik. På begge områder bør Danmark tage sin stilling op til revision...

Fleiri danskar stjórnir hava annars viljað tikið júst hesi mál upp.

Alfredsson setir ilt millum bróðurfólk.

Tað er rættuliga greitt, at grønlendska blaðið metir uppgávuna hjá Alfredsson vera at seta ilt millum danir og grønlendingar og at skapa hatur millum hesi fólkini. Og sum tey ábyrgdarbløð tey grønlendsku eru, vilja tey ikki medvirka til nakað, sum ríður so lágt sum hetta.

Tað er neyvan ivi um, at verður farið at grópa í skjøl upp til 50 ár aftur í tíðina verður lætt at finna prógv fyri, at "danir hava verið fanar" í Grønlandi, um tað bert verða tikin tey "prógv" sum hóska endamálinum. Men ein skal nærum vera "professari" fyri at síggja burtur frá øllum tí, sum annars er hent seinni í Grønlandi á sjálvstýrisøkinum. Verandi heimastýrisskipan í Grønlandi er jú vorðin til í semju við valdar grønlendskar myndugleikar í 1979, og hon er enntá góðkent við eini fólkaatkvøðu. Her skal eisini vera havt í huga, at Grønland er einasta øki í ES, sum er farið út úr ES eftir at hava verið innlimað. Hetta høvdu teir ikki kunnað gjørt uttan danskan stuðul. So danir hava sanniliga virt grønlendsk sjónarmið í nýggjari tíð.

Grønlendsku bløðini troysta sær ikki...

Grønlendsku bløðini hava tilvitað ikki vilja tikið táttin upp um donsku "statsrasismuna". Tey vita, sum øll onnur, at rasisma er eitt tað mest ræðuliga fyribrigdi, sum kann hugsast. Ikki minst tá talan er um "statsrasismu", t.v.s. tá staturin stendur fyri rasismu. Her kann bert verða hugsað um nasismu í Týsklandi og apartheid í Suðurafrika, har politikkurin hjá statinum júst var grundaður á rasismu. Og at fara at leggja danska statin undir rasismu, grundað á ein einstakan setning í einum 48 ára gomlum skjali, helst skrivað av embætismanni, sum neyvan er til longur, politikkur hjá einum flokki í einum landi at seta ilt millum fólk í tveimum øðrum londum. Tað sum lýsir hesa mannagongd meira enn nakað er, at tey sjónarmið, sum tjóðveldisflokkurin dyrkar í sínum málgagni í Føroyum í Grønlandi verða mett at fáa ta avleiðing, at "der opstår had til Danmark og danskerne". Hesum hava teir ikki áhuga fyri í Grønlandi...

Dok.

Grundað á "óheftan" íslendskan professara verður danski staturin lagdur undir rasismu. Hetta er ein boðskapur, sum er funnin fressur hjá teimum á Fregnum og teirra fólkatingsumboðan. Tí hevur boðskapurin eisini hingið í hvørjum kioskglugga í eini viku, so hann eisini skal sleppa at "siva" inn hjá føroyingum.

Hetta er ein greið roynd at stuðla uppundir ta somu ávirkan, sum hesin boðskapur var ætlaður at hava í Grønlandi. Afturat hesum leggur flokkurin seg útí viðurskiftini millum grønlendingar og danir við at royna at seta ilt millum hesi fólkini.

Men grønlendsku bløðini hava, mótsatt Fregnum, víst hesum boðskapi frá sær. Tey meta nevniliga henda boðskapin at elva til hatur til danir. Men hesum hava tey ikki brúk fyri. Í Grønlandi!

Fullveldiseksperimentið 2

William Max Hansen
Valevni Javnaðarfloksins í Eysturoy

Fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, var kanska tann fyrsti uttanfyristandandi til yvirorðnað at gjøgnumskoða okkara natiolistisku "røttu" føroyingar og teirra órealistiska fullveldiseksperiment. Nyrup gjørdist – sum øllum kunnugt - eitt sindur ópopulerur hjá sitandi samgongu, tí hann tordi at standa í móti og seta fólkaræðislig krøv um, at møguligar stórbroytingar íríkisfelagsskapinum skuldu hava ein stóran meirluta av Føroya fólki aftan fyri seg, áðrenn tær vórðu settar íverk. Tað sama lovaði samgongan eisini alment, men teir gingu frá givnu lyftunum.

Hinvegin stóð Nyrup við sítt lyfti til Føroyar fólk um fólkaræðisliga kravið, og við síni professionellu og mangan ósmædnu og bersøgnu framferð hevur Nyrup verið eitt gott bulvirki fyri fólkaræði og lívsfrælsi hjá vanliga føroyinginum.

Fullveldiseksperimentið bleiv umsíðir kvalt, seinni fekk so ávísur partur av samgonguni eisini eyguni upp fyri, hvat hesin framferðarháttur í fullveldismálinum veruliga var við at føra okkum út í, og tá segði eisini hann stopp. Fullveldiseksperimentið hevur, tá samanum kemur, minni enn ein fjórðing av føroysku veljarunum aftan fyri seg sambært valinum 20. November 2001.

Nyrup eigur sostatt eina stóra tøkk uppiborna fyri sína framskygnu og demokratiskt gevandi bróðurhond til Fólkaræðið og lívsfrælsið í Føroyum.

Anders Fogh Rasmussen, eigur eisini tøkk uppiborna fyri somu linju og sína annars greiðu og positivu støðu á vitjan síni. Politikkurin landanna millum eigur sjálvandi at førast demokratiskt og javnbjóðis í einum positivum anda. Fólkasins avgerð skal byggja á realitetir og ikki á hissini nationalromantiskar dreymamyndir.

Javnaðarflokkurin vil so skjótt sum møguligt fáa sett í gildi tað so nógv tilrongdu sjálvstýrislógina, sum greiðir ríkisrættarligu viðurskiftini. Sjálvstýrislógin er grundarlagið, sum tann breiða politiska semjan kann byggjast á. Sjálvstýrislógin greiðir viðurskiftini millum Føroyar og Danmark á ein virðiligan og skynsaman hátt, har vit økja okkara sjálvstýri frá partvísum til fullfiggjað sjálvstýri, so hvørt sum vit skapa figgjarligar og fyrisitingarligar fyritreytir.

Hettar ber í sær, at Føroya Løgting sum umboð fyri Føroya fólk verður hægsti mynduleiki í Føroyum, og at Føroyar verða staðfestar sum tjóð við fullum sjálvsavgerðarrætti.

Sjálvstýrislógin skal í sáttmála staðfesta Føroyar og Danmark sum tvey sjálvstøðug og javnsett lond í ríkisfelagsskapi hvørt við annað. Sáttmálin skal taka burtur allar formligar avmarkingar fyri, hvørji mál og málsøki kunnu verða yvirtikin. Tað merkir, at øll mál koma undir føroyskt ræði, tá Føroya Løgting gera tað av.